

Mynd: Havila Neptune

# Lívið umborð á einum frálandaskipi

**Jógvan Hugo Gardar**

03.03.2015 - 19:32

Oljan.fo

Norska frálandaskipið Havila Neptune er júst komið aftur til Aberdeen, har tey bíða eftir at nýggj uppgáva skal gerast fyri Statoil.

Havila Neptune er eitt av trimum frálandaskipum hjá Havila Shipping, sum í løtuni sigla í sokallaða spot-marknaðinum í Norðsjónum. Tað merkir at teir ikki hava nakra fasta longri avtalu, men taka uppgávurnar so hvørt tær koma.

Í morgun legði mannining út eina myndarøð sum vísir lívið umborð á skipinum. Havila Neptune er útnevnt til skipið hendan mánaðin hjá reiðarínum.

Manningin er samansett av persónum við nógvum ymsum royndum. Manningin skrivar at í løtu er manningin sett saman av einum tónleikara, einum softice-serfrøðingi úr Føroyum, ein bilmekanikara, einum myndamanni, einum byggiserfrøðingi umframt onnur sum hava langar royndir í oljuvinnuni.

Beint áðrenn Havila Neptune kom til Aberdeen fingu teir boð um at fara at hjálpa við at fáa Byford Dolphin til Belfast. Nú verður bíða eftir boðum til næstu uppgávuna, ið skal gerast fyri Statoil, og tað sleppa teir til arbeiðis aftur í dag ella í morgin.










